Katrin Erlendsdóttir 09.05.2007 - 13:22

# Rakel Helmsdal fingið íslendska virðisløn

**Í Íslandi letur mentamálaráðið tólv virðislønir til bókmentir. Ein teirra er Barnabókaverðlaun menntaráðs Reykjavíkar.**



Virðislønin er í tveimum, onnur verður latin upprunabók og onnur verður latin týðara.

Í ár fingu Áslaug Jónsdóttir (Ísland), Kalle Güettler (Svøríki) og Rakel Helmsdal (Føroyar) virðisløn fyri myndabókina Stór skrímsl gráta ikki. Bókin kom út í øllum trimum londunum í 2006. Stór skrímsl gráta ikki er onnur bókin, sum er grundað á norðurlendskt samstarv. Fyrsta var Nei! segði lítla skrímsl. Ein bók, sum fekk góð ummæli og varð heiðrað við íslendsku Dimmalimm heiðursløníni í 2004.

Har fyrsta bókin greiddi frá, hvussu synd tað var í lítla skrímsli, tí tað ræddist stóra skrímsl, so greiðir henda frá um stóra skrímsl, sum, sjálvt um tað er stórt, kann vera ólukkuligt, tí at tað heldur lítla skrímsl duga alt betur.

Nevndin sigur m.a. í grundgevingini, at bókin Stór skrímsl gráta er sera vøkur, hon er einføld, men hevur ein greiðan boðskap um, at øll eru ymisk, og at tað er rætt at vísa kenslur sínar. Myndirnar sita væl saman við tekstinum, tær eru skemtiligar og litfagrar.

Áslaug Jónsdóttir tók ímóti heiðursløníni vegna allar tríggjar rithøvundar á samkomu í Reykjavík 19. apríl.